UNDANGÓÐKENNING

# Nýggjur skúladepil við Marknagil
## Undangóðkenning

Í sambandi við bygging av nýggjum skúladepli við Marknagil í Tórshavn bjóðar Landsverk við hesum áhugaðum heildarráðgevarum at biðja um undangóðkenning til at geva tilboð í avmarkaðari útbjóðing.

**Um verkætlanina og útinning av hesari kann upplýsast:**

1. Byggiharri:
Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postboks 78
FO–110 Tórshavn
Teldupostadressa: lv@lv.fo

2. Útbjóðingarháttur:
Avmarkað útbjóðing, ið ikki er fevnd av útbjóðingarreglum í EU.

3. Lýsing av verkætlanini:
Avgerð er tikin um, at ein skúladepil skal byggjast við Marknagil í Tórshavn. Skúladepilin skal hýsa virkseminum hjá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Tórshavn, Tekniska Skúla í Tórshavn og Føroya Handilsskúla í Tórshavn.Mentamálaráðið er saman við Landsverki og teimum trimum skúlunum farið undir at fyrireika hesa bygging.

Skúladepilin við Marknagil verður karmur um framtíðar samskipanina og menningina av øllum miðnámsútbúgvingunum í høvuðsstaðarøkinum. Depilin verður skipaður við einari felags leiðslu.

Skúladepilin við Marknagil er størsta byggiverkætlanin í føroyskari skúlasøgu. Nýggi skúladepilin skal byggjast á einum øki tætt við Marknagil í Tórshavn. Verandi bygningar hjá Føroya Handilsskúla, ið eru umleið 1800 m², kunnu takast við í samlaðu byggingina, og ynskt verður, at møguleiki verður fyri eini framtíðar útbygging av skúladeplinum. Sum útgangsstøði er samlaði fíggjarkarmurin fyri verkætlanina 391 mió kr. uttan mvg.

Uppgávan umfatar heildarráðgeving (arkitekta- og verkfrøðingaráðgeving) í sambandi við gerð av verkætlanaruppskoti, høvuðsverkætlan, útbjóðing, verkætlanaruppfylging v.m. fyri byggingina.

4. Býti av arbeiðinum:
Tað er bert møguligt at bjóða upp á alla uppgávuna sum heild.

5. Útbjóðingarháttur:
Millum umsøkjarnar, ið hava søkt um undangóðkenning, verða valdir 5, ið fáa innbjóðing til at lata inn tilboð. Sum partur av tilboðnum skal gerast eitt skipanaruppskot fyri loysn av "torginum" og tilhoyrandi virksemi. Samsýning verður ikki goldin fyri innkomin tilboð.

Grundað á innkomnu tilboðini er ætlanin at velja í mesta lagi 2 luttakarar, sum fáa innbjóðing til at vera við í parallellari uppgávu (parallelt opdrag). Í sambandi við parallellu uppgávuna verða hildnir eitt ávíst tal av samrøðufundum (dialogmøder). Aftan á samrøðufundirnar lata luttakararnir inn skipanaruppskot fyri allan skúladepilin til endaliga døming.

Grundað á samrøðufundirnar og skipanaruppskotið verður kosin ein vinnari av parallellu uppgávuni. Tilboðsgevarin, ið luttekur í parallellu uppgávuni, men ikki fær tillutað uppgávuna, fær eina samsýning áljóðandi kr. 200.000, uttan mvg, og fær skjalprógvað útlegg endurgoldin.

6. Tíðarætlan:
Roknað verður við, at arbeiðið við verkætlanaruppskotinum (prosjektuppskotinum) og høvuðsverkætlanini (høvuðsprosjektinum) byrjar fyrst í november 2009, og at byggingin byrjar í november 2011.

7. Síðsta freist fyri umbøn um luttøku:
Mikudagin, tann 17. desember 2008 kl. 12.00.

8. Adressan, hagar umbønin skal sendast:
Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postboks 78
FO–110 Tórshavn
Teldupostadressa: lv@lv.fo

9. Nær útbjóðingartilfarið verður sent út:
Útbjóðingartilfarið verður væntandi sent út fyrst í februar 2009.

10. Tíðarfreist fyri at lata inn tilboð:
Tíðarfreistin verður ásett í útbjóðingartilfarinum og verður væntandi í viku 17 2009.

11. Upplýsingar um fíggjarligu og teknisku viðurskifti heildarráðgevans:
Fyri at sleppa upp í part við undangóðkenningini skulu umsøkjarar upplýsa, hvat teir sum heildarráðgevar megna, fíggjarliga og tekniskt. Hetta verður gjørt við at geva fylgjandi upplýsingar:

- Navn, bústað, cvr nr., telefon- og faksnummar og teldupostadressu.
- Yvirlit yvir byggiverkætlanir, ið umsøkjarin hevur útint seinastu 5 árini. Tað er bert møguligt at vísa til lidnar verkætlanir ella verkætlanir, sum eru í gerð. Fyri hvørja verkætlan skal upplýsast byggiharri, leiklutur heildarráðgevans, nær arbeiðið er byrjað, arbeiðstøkukostnaður og kontaktpersónur.
- Úr yvirlitinum skulu veljast tær báðar mest viðkomandi verkætlanirnar, sum umsøkjarin hevur útint. Fyri báðar verkætlanirnar skal fyriliggja ein nágreinilig lýsing. Um tað er møguligt, kann umsøkjarin lata byggiharraviðmæli fyri hesar uppgávur. Í byggiharraviðmælinum skulu vera upplýsingar um verkætlanirnar, upplýsingar um leiklutin hjá umsøkjaranum og meting frá byggiharranum um avrik umsøkjarans. Í sambandi við val av heildarráðgeva tilskilar byggiharrin sær rætt til at seta seg í samband við teir uppgivnu kontaktpersónarnar.
- Váttan um miðaltal á starvsfólkum býtt yvir viðkomandi fakbólkar, um møguligt, fyri seinastu 3 árini.
- Upplýsingar um útbúgvingar og fakligar førleikar annars hjá starvsfólkunum.
- Kunnleika til serlig føroysk viðurskifti, so sum veðurlagsviðurskifti, arbeiðsmarknaðarviðurskifti og lóggávu og reglur, ið eru galdandi fyri slíka bygging v.m.
- Upplýsingar um roknskapartøl fyri 3 tey seinastu roknskaparárini. Her undir netto umsetningur, úrslit aftaná skatt og samlað ogn og skuld (eginogn), um so er, at almannakunngerð av hesum er lógarásett í tí landi, haðani umsøkjarin er.
- Skjalprógv fyri viðkomandi ábyrgdartrygging.
- Trú- og heiðurs váttan um skuld til tað almenna sambært lógaráseting í tí landi, haðani umsøkjarin er.

Um talan er um eitt toymi av ráðgevarum, ið samstarva um at loysa uppgávuna, skal greitt upplýsast, hvør heildarráðgevarin í toyminum er. Um so er, at heildarráðgevarin brúkar undirráðgevarar, skulu hesir eisini lata inn omanfyri nevndu upplýsingar. Er umsøkjarin ein felagsskapur (konsortium) av ráðgevarum, skal felagsskapurin veita einum av luttakarunum fulltrú, ið skuldarbindur allan felagsskapin, eins og byggiharrin krevur samábyrgd.

Ein fortreyt er, at heildarráðgevarin setir manning í Føroyum, meðan prosjekteringin fer fram. Hetta er at skilja soleiðis, at í minsta lagi verkætlanarleiðarin skal vera til staðar í Tórshavn í vanligari arbeiðstíð, meðan prosjekteringin fer fram, og at lyklapersónar frá ávikavist arkitekt-, konstruktións-, hvs- og el-ráðgevara vera til staðar í Tórshavn í vanligari arbeiðstíð, meðan prosjekteringin av teimum ávísu greinunum fer fram, og annars luttaka á viðkomandi fundum undir allari prosjekteringini. At nevndu persónar eru í Tórshavn, meðan prosjekteringin fer fram, er ein treyt fyri tillutan av uppgávuni.

12. Metingarstøðið, ið er grundarlag fyri tillutan av uppgávuni:
Fylgjandi viðurskifti verða tikin við í metingini av tí einstaka tilboðnum:

- Skipanaruppskot av „torginum".
- Samsýningin til heildarráðgevaran
- Hvussu prosjekteringin verður framd
- Bygnaður og samarbeiði

Metingarstøðið verður nærri útgreinað í útbjóðingartilfarinum.

13. Aðrar upplýsingar:
Lýsingin í sambandi við undangóðkenningina er orðað á føroyskum og donskum máli. Eru ivamál í sambandi við orðingarnar, er tann føroyski teksturin galdandi.

Kappingarmálið er føroyskt ella skandinaviskt. Hetta vil siga, at undangóðkenningartilfarið skal vera á føroyskum, donskum, svenskum ella norskum. Umsøkjarar, ið ikki lúka hetta krav, verða ikki mettir, líka mikið um lýsingarmálið hevur verið annað enn kappingarmálið.

Undangóðkenningartilfarið skal latast í 2 eintøkum.

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*

LANDSVERK *byggir land*